

www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 10 - 2011

# ES vil skerpa krøv til frálandavinnu

Tað er alt ov stórur vandi fyri einari stórari vanlukku innan oljuvinnuna í Evropa, og tí vil ES-nevndin hava strangari reglur á økinum. Í gjár legði nevndin fram eitt uppskot um eina nýggja lóg innan heilsu, trygd og umhvørvi í oljuvinnuni. Günther Oettinger, sum er ES-kommiserur í orkumálum, segði í sambandi við framløguna, at tað verður neyðugt at fáa alla oljuna og alt gassið upp undan havbotninum, tí tørvurin á orku gerst bara størri og størri. Men vit mugu forða fyri vanlukkum sum teirri í Meksikoflógva, og hetta uppskotið er eitt týðandi stig ímóti tryggari frálandavirksemi, sum verður til gagns fyri bæði okkara borgarar og okkara umhvørvi, segði hann. Uppskotið hjá ES-nevndini er umfatandi og umfatar alt leiti- og framleiðsluvirksemi innan olju og gass, hvussu útgerðin skal sniðgevast, og hvussu hon skal beinast burtur aftan á nýtslu. Uppskotið sigur eisini, at ídnaðurin í Evropa skal samskifta við landsmyndugleikarnar við tí fyri eyga at bøta um trygdina í frálandavinnuni. Lógaruppskotið sigur eisini, at teir myndugleikar, sum lata feløgum leiti- ella framleiðslurættindi, skulu syrgja fyri, at bara feløg við góðkendum tekniskum og fíggjarligum førleika til at átaka sær ta neyðugu trygdina skulu fáa loyvi at virka á landgrunninum. Lógin ger eisini greitt, at olju- og gassfeløg hava alla ábyrgd av at bøta umhvørvisskaða, ið stendst av útláti. Í dag skal Günther Oettinger vitja Troll-pallin í Norðsjónum saman við norska olju- og orkumálaráðharranum, Ola Borten Moe, og Øystein Michelsen, deildarstjóra hjá Statoil.